gult cyan magenta svart

Vi›merkingar:

Vit hava eina vir›iliga søk at strí›ast fyri

Í grein í Dimmalætting seinasta fríggjadag og nú eisini í Sosialinum mikudagin sæst, at Meinhard Andreasen er vor›in rættiliga uppøstur av einari grein í Dagbla›num herfyri, har eg seg›i nøkur or› um sjálvst‡risætlanir samgongunnar og harma›ist um stø›una, sum andstø›an hevur tiki› - serliga Javna›arflokkurin.

Sambandsflokkinum hev›i sjálvandi eingin rokna› naka› vi› í hesum málinum.

Meinhard rópar meg opportunist og er annars rættiliga ósakligur, og tí skal eg ikki gera tær stóru vi›merkingarnar til greinina. At vera opportunistur ella ráksnúningur, sum ta› eitur á føroyskum, er at gera naka›, sum loysir seg í løtuni, uttan at hugsa um onnur ella framtí›argongdina og uttan at hava nøkur prinsipp. Ta› er sjálvandi altí› ein vandi hjá einum politikkara at snúgva vi› rákinum í almannahugsanini og at broyta meining, alt eftir sum ta› passar best. Mín vón er, at hetta ikki skal ey›kenna meg og okkum, sum sita á tingi.

Tá i› ta› kemur til hetta vi› sjálvst‡rinum, haldi eg meg i› hvussu er ikki hava veri› opportunist. Eg havi altí› veri› sannførdur um og havi eisini so mangan ført ta› fram, at einki kann vera meira grundleggjandi rætt enn at vilja klára seg sjálvur — at standa á egnum beinum og ikki liggja ø›rum til byr›u. Hetta er galdandi fyri okkum sum einstaklingar, og sjálvandi er hetta eisini galdandi fyri okkum sum land og sum fólk.

Vit hava nú í meira enn 50 ár liva undir eini heimast‡rislóg í einum sokalla›um ríkisfelagsskapi, sum í veruleikanum ikki er nakar felagsskapur, men ein skipan, har Føroyar eru undirlagdar Danmark. Hetta hevur havt vi› sær, at vit hava havt eitt sera "ullint" ella ógreitt valds- og ábyrgdarb‡ti, tí á avgerandi økjum hava heimildirnar ligi› í Føroyum, men tann evsta ábyrgdin í Danmark. Heimast‡rislógin hevur ikki givi› okkum veruligt sjálvst‡ri og ta ábyrgd og ábyrgdarkenslu, sum eitt veruligt sjálvst‡ri sjálvandi hevur vi› sær. Hetta hevur havt sera óhepnar fylgjur fyri Føroyar — ta› sóu vit best undir kreppuni fyrst í 90-unum.

Vali› fyri gó›um tveimum árum sí›ani vísti greitt, at ein stórur meiriluti av Føroya fólki ynskir, at broytingar ver›a gjørdar í vi›urskiftunum okkara vi› danir, og samgongan, sum kom til tá, setti sær fyri at

Jógvan á Lakjuni

savnsmynd

gera naka› veruligt vi› hetta stóra mál. Vit settu okkum fyrst og fremst fyri at taka fulla ábyrgd av øllum føroyskum vi›urskiftum, solei›is at valds- og ábyrgdarb‡ti› millum Føroyar og Danmark gerst púra greitt.

Okkara ætlan er ikki at slíta alt samband vi› Danmark, men vit ynskja at fáa fult lóggávuvald í okkara egna landi, og á tí grundarlagnum vilja vit samstarva vi› Danmark. Hetta er eitt vir›iligt mál at hava sett sær.

Men so eru ta› pengarnir. Sum ta› so mangan er sagt og skriva›, so er ein avgerandi fortreyt fyri, at vit kunnu taka politiska ábyrgd, at vit ver›a loyst úr tí búskaparligu og politisku bindingini, sum blokkstu›ulin hevur vi› sær. Skulu vit standa á egnum beinum, er fyrsta treyt, at vit megna at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap. Og fortreytirnar fyri at gera hetta hava ongantí› veri› so gó›ar sum nú, og tí hava vit eisini bi›i› danir um eina skiftistí›, har blokkurin eftir nøkrum árum ver›ur minka›ur burtur í einki.

Og her er ta›, at andstø›an leggur okkum undir at hava lagt avger›ina um føroyskt fullveldi í hendurnar á dønum at gera av, og Meinhard Andreasen sigur enntá, at vit als ikki vilja hava ábyrgdina, men bara bidda um at skula valda, har sum danir skulu gjalda.

Men hetta er ein so stór rangsnúgving av veruleikanum, sum ta› kann vera. Ta› sigur seg sjálvt, at tá i› veitingin úr Danmark er so stór sum tri›ingurin av fíggjarlóg løgtingsins ella meir, og vit eru vor›in so bundin av henni, so mugu nøkur ár til at minka hana burtur. Ta› er sum vi› einum rúsevnismisn‡tara, tá i› hann skal til avvenjingar. Tú kanst ikki bara taka rúsevni› frá honum í einum, men mást spakuliga venja hann av vi› ta›, tí annars fær hann abstinensir og ver›ur dey›asjúkur.

Vit ætla sanniliga ikki, at danir skulu gjalda fyri okkara fullveldi. Ta› er beint tvørturímóti! Vit vilja sleppa teimum donsku skattgjaldarunum undan framhaldandi at skula gjalda tær árligu veitingarnar til Føroya.

Men her er ta›, at tann danska stjórnin — tíverri vi› Sambands- og Javna›arfloksins vælsignilsi — vísir frá sær at geva føroyskum sjálvst‡ri ein rímiligan møguleika. Nyrup veit, hvar hann skal tr‡sta. Ta› er, sum løgma›ur tók til: Vit fáa vali› ímillum at ver›a verandi undir Danmark ella at ver›a kasta› út í fíggjarligan "turbulens" vi› eini skiftistí› uppá bert 3-4 ár.

Men føroyingar vilja taka ábyrgdina av sær sjálvum, og stuttligt er at síggja veljarakanningarnar, sum vísa, at fáa vit eina rímiliga skiftistí›, so tekur ein grei›ur meiriluti av føroyingum undir vi› ætlanum samgongunnar. Hetta vísir, at føroyingar ikki framhaldandi ynskja at liggja donsku skattgjaldarunum til byr›u, men vilja sjálvir grei›a síni vi›urskifti á øllum økjum.

At Meinhard Andreasen sum sambandsma›ur er keddur av, at vit royna at fáa valdi› í okkara egna landi, skilji eg sera væl. Sambandsflokkurin hevur ongantí› veri› vi› til at tiki› naka› stig á sjálvst‡rislei›. At teir nú siga seg vilja ganga vi› til n‡skipanir, eru tær beru lótir. Føroyingar minnast, hvussu sambandsflokkurin vi› Edmundi Joensen á odda í sí›stu samgongu hótti vi› n‡vali, hvørja fer› onkur bara nevndi, at broytingar máttu gerast í vi›urskiftunum vi› danir.

Vit í samgonguni hava bara eitt einfalt ynski um at taka ábyrgdina av okkara egna landi og hava bi›i› danir um eina rímiliga skiftistí›. Vit hava eina gó›a og vir›iliga søk at strí›ast fyri — og einafer› koma vit á mál! Tí ivist eg ikki í!

6. juli 2000
Jógvan á Lakjuni, tingma›ur

Til Paul Watson

– et takkebrev til søens hyrde fra en rådvild skare af proselytter

Endelig kom du tilbage til vore fordærvede øer. Vi havde næsten mistet modet. De mindre stærke i troen har desværre for længst forladt menigheden. De blev ved at påstå, du ikke kunne være Den Udvalgte, da din kollega allerede viste sig for diciplene efter 14 dage. Men 14 dage eller 14 år –·det har ingen betydning i en hellig sag, hvor vi arbejder for de næste årtusinder.

Vi, den hårde kærne af dine tilhængere, har holdt modet oppe ved at kigge på videoen fra din sidste heltmodige optræden på Færøerne, mens vi lyttede til vemodig hvalsang på båndoptageren. Det musikalske kan være noget monotont, men teksterne, – med deres hjerteskærende budskab, – har flået vore sjælerødder i laser.

Havets blues

Vi er meget beæret over, at du nu igen gider bruge din kostbare tid på vore små øer og de få hvaler, vi dræber. Men du har ret – det er ikke råddenskabens størrelse, men dens blotte eksistens, der er det essentielle. Vi troede egentlig ,at dit sidste besøg var en forprøve på større opgaver ude i verden, men vi forstår nu, at tiden ikke er moden til at tage fat på de store hvalfangenationer. Så vi vil endnu engang takke dig for, at du har udvalgt os til at finpudse din angrebstaktik.

Ellers må vi sige, det glæder os, at du har fået lidt sul på kroppen. Vi har været meget bekymret for at »Sagen« ville ødelægge din sarte og følsomme fysik. En forhutlet og udmagret Guru er jo heller ikke absolut tillidsvækkende på de bonede gulve, når man skal bede om penge fra sponsorerne. Her har et jakkesæt og lidt pondus altid gjort sig bedre. Dit financielle geni imponerer os meget. Tænk, at alle amerikanske skolebørn kan købe en aktie i en hval, der svømmer frit omkring. Lidt i stil med at sælge Kristi kors i småbidder. Ideen er ikke ny, men effektiv.

Ikke alene har du givet de små amerikanere et Håb, men du har også fået financieret dit hellige korstog. Imponerende! Jeg har selv båd, så jeg ved, hvor dyrt det er i drift, hvis man selv skal betale.

Nu ved jeg godt at landjorden ikke er dit område, men jeg vil alligevel bede om et godt råd fra en professionel. Mit problem er: Bønderne. Jeg vågner nat efter nat badet i sved ved tanken om det ufattelige barbari, der år efter år finder sted over hele jorden. Hvert forår bliver tonsvis af sædekorn kastet i Guds jomfruelige jord. Her ligger det intetanende og spirer til det penetrerer jordskorpen og sætter de vidunderligste frugter. Og hvad sker der så? Jo, – dyriske landmænd uden forståelse for de små væksters sjæleliv, mejer brutalt de spæde liv til jorden. Det er ikke engang personligt, – nej, det er industrielt massemord. Her må gribes ind.

Kære Paul! Kunne man sælge de små amerikanske skolebørn en aktie i et sædekorn i Ukraine? Bare en tanke, – måske kunne dine PR-folk undersøge sagen.

Jeg er meget glad for at høre, at dit skib ikke leder spildevand overbord. Specielt er jeg meget glad for jeres nye toiletsystem. 50 journalister og en stor besætning producerer jo en del affaldsstoffer, selvom I mest lever af luft og hellig forargelse. Så systemet, hvor alt bliver pakket ind i plastik og sendt til Amerika, er langt forud for sin tid.

Det havde heller ikke været så godt, hvis en kåd hval i sin uskyldige leg var blevet konfronteret med de sørgelige rester af en af dens medskabninger. En sådan hval kunne let få alvorlig psykiske problemer, og det er ingen let sag at få den til at ligge stille på briksen, mens den er i terapi.

Til slut vil vi i menigheden ønske dig held og lykke med dit årlige krydstogt,. – Sorry – korstog. Skulle du i din iver komme til at sejle et par færøske både ned, har du vor fulde forståelse. Ignoranterne har jo selv bedt om det. Man kristnede jo heller ikke indianerne, uden at det kostede blod.

Venlig hilsen, en ven i ånden
Hans Jensen, Hvalvík

Viðmerking:

Hvat er at samráðast um? – Eitt heilt land, Atli Hansen!!!

Í Dimmalætting 6/7-2000 hevur fyrrverandi løgtingsmaður sambandsfloksins eina grein, sum bara kundi verið skrivað av einum sambandsmanni, tí tað gjøgnumgangandi er, at undirbrotligheitin yvir fyri donsku myndugleikunum nær óhoyrdar hæddir, samstundis sum føroysku fjølmiðlarnir fáa á pukkilin, m.a. fyri at geva Høgna Hoydal, landsstýrismanni, alt ov fríar teymar: »Høgni Hoydal sleppur ofta ov lætt undan naskum og kritiskum spurningum frá føroysku pressuni«.

Men sambært gøtumanninum Atla Hansen eru vónir fyri framman: »… og tíbetur fáa vit okkurt brævið frá Nyrup um gongdina í málinum og donsku sjónarmiðini…«, í hesum partinum í greinini tekur undirbrotligheitin rættiliga dyk á seg; tað er eisini rættiliga margháttligt, at ein sambandsmaður skal sóknast eftir teimum donsku sjónarmiðunum, tí ein og hvør veit, sum bara hevur fylgt eitt sindur við í fullveldiskjakinum, at sambandsmenn og javnaðarmenn hava sum føroyingar umboðað donsku sjónarmiðini, og hetta prógvar enn einaferð, at trupulleikin liggur í Føroyum, men hinvegin hevði eingin roknað við stuðli frá sambandsflokkinum, tí sum Atli Hansen sjálvur tekur til: »Um danska pressan og Nyrup eru á rættari leið, so er Høgni Hoydal á skeivari leið. Hetta kallast manipulering ella villleiðing, og tað er naivt út um øll mørk av einum fyrrverandi journalisti (tíðindafólki) at halda, at hetta ber til í einum upplýstum samfelag í dag – sjálvt uttan pressu (fjølmiðlar)«. Her síggja vit sambandslyndið aftur, at seta spurnartekin við føroysku útspælini í samráðingunum og líkasum leggja upp til, at danska stjórnin hevur rætt, sjálvt um danska stjórnin ikki vil grundgeva fyri tí, sum hon tvíheldur um; og tað burdi bygdarmaður Gøtu Trónda vitað, at uttan grundgevingar íkemur skjótt spurningurin um haldbæri fyri tí, sum tvíhildið verður um.

Hálovingin hjá Atla Hansen til donsku fjølmiðlarnar fær rættiliga nógv pláss í greinini, og endurgevingar, sum hava eittans endamál, nevniliga at fáa okkum føroyingar at kenna okkum illa, eru høgt í metum hjá sambandsmanninum. Muran er hin gamla, og sum vit kenna so sera væl, tað er meira týdningarmikið hjá einum sambandsmanni at seta sínar egnu landsmenn í ringt ljós og við háloving av tí, sum m.a. danskt er, verður hetta ført fram ferð eftir ferð. Men lat meg minna Atla Hansen á orðatakið »tað er vána fuglur, sum drýtur í egið reiður«, tað er sera væl hóskandi í hesum sambandi. Markleysa undirgevingin fyri øllum donskum yvirvaldi og sjálvt donskum fjølmiðlum fær helst vanliga føroyingin at hveppa seg – hetta skuldi fingið sambands- og javnaðarmenn at hugsað seg eitt sindur um, tí fáir eru teir føroyingar, sum hava nakað gott at gera Nyrup – so henda hálovingin hjá afturhaldinum kann lættliga koma aftur um brekku.

Atli Hansen – tað er at kasta torvmold í eyguni á føroyingum, at tú gevur teg út fyri at vera »ein liberalur føroyingur, ið arbeiðir fyri sjálvbjargni og sjálvræði«, sum tú ger í greinini. Tí øll vita, at tað er eingin sambandsmaður, sum arbeiðir fyri sjálvræði og sjálvbjargni í Føroyum, hvørki so ella so, tí tað er beinleiðis í andsøgn við tilverugrundarlagið hjá sambandsflokkinum. Men hetta talar helst fyri tínum politiska støði.

Tú skal heldur ikki leggja upp til, at meirilutin av Føroya fólki og Nyrup eru samd í ríkisrættarliga spurninginum, tað hevur tú fyri tað fyrsta einki ánilsi av, tí tú hevur onga peiling av, hvat eitt alternativt uppskot inniheldur, men fær tú ríkisfelagsskapin, so ert tú helst nøgdur. Fyri tað næsta, so er Poul Nyrup Rasmussen helst tann danski politikarin, sum føroyingar vilja hava sum minst – helst einki – við at gera.

Tú veitst eins væl og eg, at møguleikin at endurnýggja okkara vælferðarsamfelag als ikki er farin fyri bakka, men heldur at viðurskiftini bæði á sjúkrahúsøkinum, skúla- og samfelagsøkinum og øðrum týðandi samfelagsøkjum hava fingið grundleggjandi viðgerð undir hesi samgonguni, har lunnar eru lagdir fyri framhaldandi sunnari menning eftir føroyskum viðurskiftum, hetta er sjálvandi eisini ímóti tínari politisku sannføring, men veruleikin nýtist tær ikki at síggja burtur frá.

Fyri at venda aftur til yvirskriftina hjá tær: »Hvat er at samráðast um?«, so vil eg fyrst vísa til mína egnu yvirskrift: »– eitt heilt land, Atli Hansen«, ja einki minni.

Hvat er alternativið hjá sambandsmonnum sum tær? Framhaldandi ríkisfelagsskapur og menning av hesum? Tað kundi verið eitt svar, sum eg kundi hugsað mær tú komst við. Hvussu skulu vit skipa okkara viðurskifti við Danmark, skal tað framvegis vera ein »gevara og móttakara skipan«, har vit fáa ein posa av pengum at byggja hetta landið upp við? Nei, Atli Hansen, tað hevði verið tann beinleiðis vegurin til búskaparligan undirgang.

Tað er avgerandi, at vit skapa fortreytirnar fyri einhvørjari menning í okkara samfelag, og tað gert tú ikki við at fáa óendaliga peningainnspræningar frá øðrum landi og letur ein part av avgerðarrættinum frá tær afturfyri, tí avgerðarrætturin er gull verdur og altavgerandi, tí hevur tú ikki hann, kunnu avgerðir verða tiknar yvir høvdinum á tær, júst sum vit hava upplivað tað fleiri ferðir í ríkisfelagsskapinum; men at vísa á hetta yvir fyri einum sambandsmanni er sum at sletta vatn á gás, tað perlar av og til endan so venda teir øllum á høvdið fyri síðan at fáa sínar egnu landsmenn at standa eftir við svartaperi – tað er sambandspolitikkur í heilt einfaldari útgávu.

Fyri at venda aftur til hvat er at samráðast um, Atli Hansen, so skal eg vissa teg um, at aðalhugsjónin hjá sambandsflokkinum er burtur fyri allar ævir. Tí eingin meiriluti í Føroyum fer at góðtaka, at avgerðarrætturin og valdið liggur nakra aðrastaðni enn í Føroyum, og tað gerst bara við at taka fult vald í Føroyum – fullveldi, og tað er endamálið við samráðingunum, um tú ikki hevur fingið tað við enn. Eitt annað kann eg eisini vissa teg um, og tað er, at tá samráðingarúrslitið fyriliggur, tá verður fólkaatkvøðuúrslitið okkara sigur, tí føroyingar vilja ikki meiri samband – tvørturímóti, tað fær tú eisini prógvað við øllum teimum veljarakanningum, sum gjørdar eru!!!

Eitt vita allir føroyingar: at tað fer eingin sambandsmaður ella sambandsflokkur at samráðast við nakra danska stjórn um broytt viðurskifti millum Føroyar og Danmark, tað hevði verið nokk at fingið eitt danskt uppskot faxað út í Tinganes til undirskrivingar, tí har góðtaka tit alt beinanvegin, tað hava tit prógvað til fulnar, so har er einki at samráðast um – og at avreiða eitt heilt land við einum pennastroki skuldu tit helst eisini klárað. Tað er frælsisstríðið, sum krevur samráðingar, og har er nógv at samráðast um.

Eg dugi ikki at fata, at tað er so rívandi galið at taka ábyrgd av sínum egnu viðurskiftum… eitt annað, sum eg eisini kundi hugsað mær at vitað er, hvat er stórbæri í at fáa pening og lata vald frá sær, ella hvussu ein kann hava sum politiskt endamál at tryggja, at vit ikki skulu gerast sjálvbjargin og hava sjálvstýri í Føroyum, skiljið tað hvør ið vil… – men tað er sambandspolitikkur við stóra S.

Jú, so sanniliga er nógv at samráðast um, men tað er ein fortreyt, at mótparturin vil samráðast, og sjálvt tá vit hava upplivað at stjórnin leggur seg tvøra og ikki vil viðgera eina rímuliga skiftistíð – sum einki hevur við biddaragongd at gera, sjálvt tá kemur afturhaldið við eftirklókskapinum í reinum sambandsanda og niðurger samráðingarnevndina, sum helst ikki kundi verið betur umboðað og hálovar mótspælinum frá donsku stjórnini.

Men hóast tað, so er endamálið við samráðingum eitt land – okkara land Føroyar, harra Atli Hansen.

Áki Andreasen

BROYTING AV FERÐSLUNI Á KÁTA HORNINUM

Gjørt verður kunnugt, at Tórshavnar Býráð hevur samtykt, at broyta ferðsluna á Káta Horninum, tvs. á vegamótinum Sverrisgøta — Niels Finsensgøta. Hetta førir við sær, at ferðslan sum kemur frá Steinagøtu kann ikki koyra oman til Vaglið, men skal snara til høgru oman eftir Sverrisgøtu.

Harumframt skal ferðslan, sum kemur frá Tinghúsvegnum oman eftir Sverrisgøtu, snara til vinstru omaneftir Niels Finsensgøtu.Boðskelti eru uppsett á Niels Finsensgøtu og Sverrisgøtu.



Tórshavnar Kommuna
Tekniska deild

gult cyan magenta svart